Klaksvíkar Ítróttarfelag
Postboks 204
700 Klaksvík
Tlf. 281904/289104
Heimasíða: www.ki.fo

## Reglur um ferðing uttanlands hjá liðum hjá ungdómsdeildini, galdandi frá 1. mars. 2015

1. Hesar reglur eru settar í verk fyri at gera greitt, hvønn politikk KÍ hevur viðvíkjandi ferðing uttanlands hjá ungdómsliðum hjá felagnum.

2. Vanliga verður loyvt liðum hjá dreingjum og gentum hjá U14 at gera eina ferð uttanlands um árið.

3. Undantaksloyvi kann verða givið øðrum ungdómsliðum.

4. Lið, sum hevur ætlanir um at ferðast uttanlands, skal venda sær til nevndarlimin fyri ungdómsfótbólt.

5. Leggjast skal fram ein fíggjarætlan fyri uttanlandsferðina. Í seinasta lagi eitt hálvt ár áðrenn fráferð.

6. Miðað eigur at verða ímóti, at ferðin verður so bílig sum gjørligt.

7. Ein ferðafrásøgn skal skrivast og latast nevndarliminum fyri ungdómsfótbólt í seinasta lagi ein mánað eftir heimkomu.

8. Um pengar framvegis eru eftir, tá alt persónligt útlegg er trekt frá, so fella pengarnir í samband við uttanlandsferðina til felagið. Tó kann avtala gerast um brúk av pengunum til frama fyri felagið í samband við nevnda lið.

9. Dystarklæðir, sum verða keypt í samband við uttanlandsferðina, koma undir "Reglur um dystarklæðir hjá ungdómsdeildini, galdandi frá 1. mars 2015."

Samtykt av nevndini tann 23. februar 2015.